# Jólakalendarin 2005

# Jólini í Hvannadali

**Partur 12**



Politistarnir fara út av politistøðini. Teir ganga gjøgnum bygdina, men beint tá teir skulu fara niðan gjøgnum bøin, dettur Erling um okkurt.

- Dugir tú ikki at ganga Erling, físir Jógvan eftir honum.

- Men eg datt um okkurt, sum ikki eigur at liggja her, sigur Erling og tekur tað upp, sum hann er dottin um. Hann bustar kavan av tí.....

- Hetta er ein jólagáva, sigur hann.

- Tað var undarligt, sigur Jógvan, meðan hann tekur pakkan frá Erlingi.

- Munnu tjóvarnir hava mist hana, tá teir flýggjaðu í nátt?

Teir ganga víðari niðan, men teir hava ikki gingið meira enn nakrar metrar, nú er tað Jógvan sum dettur. Hann dettur so harðliga, at høvdið fer langt niður í kavan. Brillurnar fyllast við kava, og Erling má halda sær fyri ikki at flenna eftir honum.

- Aftur ein gáva Erling, tað er undarligt.

Teir ganga varisliga víðari, og nærri teir koma húsinum hjá trøllinum, fleiri gávur finna teir. Tá teir standa uttanfyri, eru teir ikki í iva um, at tað eru trøllini, sum hava stolið allar gávurnar. Teir banka uppá.

- Lat upp, hetta er løgreglan, rópar Jógvan við harðari rødd.

Trølla Omman fer yvir at hurðini og læsir upp.

- Góðan morgun Jógvan og Erling – komið innar og fáið tykkum kleynur og kaffi.

- Hey Jógvan og Erling, ja kom inn og setið tykkum, sigur ein glaður Trølla Pætur.

- Kleynur og kaffi kunnu tit sjálvi eiga. Tit eru hervið handtikin fyri at hava stolið allar jólagávurnar í Hvannadali.

- Hvat er hetta tú sigur Jógvan, vit hava ikki stolið nakað, sigur ein forskrekt Trølla Omma.

Trølla Pætur hevur lagt bókina frá sær. Her er okkurt galið – hvørki eg ella omma hava stolið nakað. Tit mugu trúgva okkum.

Erling tekur í Trølla Pætur. Kunnu tit so siga okkum, hvussu tað ber til at gávur liggja allan vegin frá bygdini av niðan til tykkara hús - og hvussu ber tað til, at gávurnar eru stolnar undan hvørjum jólatræ í Hvannadali í nátt, men ikki hjá tykkum. Nei nei, sigur Jógvan:

- Her er einki at ivast í, tað eru tit, sum eru tjóvarnir. Komið tit avstað við okkum – tit skulu í geglið.

Trølla Omman fær ikki meira enn sløkt fyri komfýrinum, so tekur Jógvan í hana og koyrir hana framman fyri sær út um. Erling hevur tikið í Trølla Pætur, og soleiðis fara tey oman gjøgnum bøin, gjøgnum bygdina og inn á politistøðina. Tá tey eru komin inn, verða trøllini koyrd í geglið.

- Nú kunnu tit verða her, til tit siga okkum, hvar tit hava goymt gávurnar.

- Jú men vit hava ikki stolið nakrar gávur. Vit vita ikki, hvat tit tosa um.

- Um tit ikki siga okkum, hvar gávurnar eru, so fara tit at sita í geglinum á jólum, á nýggjárinum og langt inn í komandi ár, sigur Jógvan meðan hann fer at ganga oman gjøgnum trappurnar. Hann vendir sær við.

- Erling, halt tú vakt her, meðan eg fari at skriva eina frágreiðing. Og ansa væl eftir hasum jassunum.

Erling setur seg á ein stól, og trøllini seta seg niður á gólvið inni í geglinum.

*Puntur 16 til jólakalendaran*



*Puntur 17 til jólakalendaran*



*Puntur 18 til jólakalendaran*



